


*Ongar reglur eru fyri ábyrgdarbýtið millum starvsfólk og avvarandi, og eingi lógarfest krøv eru um virkisætlanir og menningarætlanir fyri tann menningartarnaða. Hetta staðfesta Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, og Jóannes N. Dalsgaard, leiðari á Trivnaðartænastuni.*

# Menningartarnað í lógloysi

**Vit mangla heilt klárt eitt lógarverk rundan um arbeiðið við menningartarnaðum. Hetta siga stjórin í Nærverkinum, Mary í Garði, og leiðarin á Trivnaðartænastuni, Jóannes N. Dalsgaard. Hvørki borgarar ella politikarar stilla krøv, og tí vera umsiting og starvsfólk noydd til at skipa øki eftir besta førimuni**

NÆRVERK
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Felagið Javni og avvarandi hjá menningartarnaðum vísti í Sosialinum í gjár á, at tey menningartarnaðu mangla trygd og verju. Eingi lógarfest krøv eru um menning, ongar greiðar reglugerðir siga, hvussu starvsfólk skulu fara við búfólkum, og tey menningartarnaðu hava ongan rætt til verju á teim økjum, sum tey ikki sjálv makta.

Stjórin í Nærverkinum, Mary í Garði, og leiðarin á Trivnaðartænastuni, sum er tann deildin í Nærverkinum, sum hevur ábyrgd fyri teim menningartarnaðu, siga bæði, at tey eru samd í atfinningunum hjá forkvinnuni í Javna, Annu Eldevig Háberg og Turið Jacobsen, sum hevur beiggja við Down's syndromi.

- Tað er ógreitt, hvør skal umboða búfólk í dag. Danska lógin er sera greið á hesum økinum, men vit hava onga líknandi føroyska lóg. Og vit mugu bara staðfesta, at vit heilt klárt mangla eitt lógarverk rundan um hetta arbeiði í Føroyum, sigur Jóannes N. Dalsgaard.

Mary í Garði heldur, at orsøkin kanska er, at vit ikki hava so drúgvar siðvenjur á hesum økinum. Síðani 1970-ini hevur arbeiðið snúð seg um at fáa nóg mikið av búplássum, men nú tá tann tørvurin er við at vera nøktaður, er tíð og yvirskot at hyggja meira breitt eftir tørvinum hjá teim menningartarnaðu.

## Ongi krøv

Tann einasti parturin av lógarverkinum, sum setur beinleiði krøv um menningætlanir er nýggja stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin. Hon umfatar fólk, sum búgva heima, her undir eisini tey menningartarnaðu, sum ikki búgva á bústovni.

- Henda skipan hevur krøv um, at einstaklingaverkætlanir skulu gerast og fylgjast. Men nakað líknandi er ikki fyri menningartarnað á bústovni, sigur Mary í Garði.

Hóast einki lógarkrav er, so royna bæði Nærverk og bústovnar at gera fastar mannagongdir, og Jóannes N. Dalsgaard sigur, at kvaliteturin á stovnunum í stóran mun er tryggjaður av pædagogisku fakligheitini hjá starvsfólkunum.

- Hóast vit eru undirløgd forsorgarlógina, so royna vit heldur at fylgja andanum í tí donsku servicelógini, har tann menningartarnaði er ein borgari við rættindinum heldur enn ein borgari undir administratión, sigu Jóannes N. Dalsgaard, formaður í Trivnaðartænastuni.

Mary í Garði, stjóri á Nærverkinum sigur, at tey kundu hugsa sær eitt pædagogiskt eftirlit, tí tað hevði gjørt arbeiði bæði greiðari og tryggari.

- Men tað ber ikki til at hava eftirlit uttan eitt lógarverk, sum greitt tilskilar hvørji krøvini eru, sigur hon.

## Hugsa ikki í rætti

Føroyski umboðsmaðurin er ein nýggjur stovnur, og bæði Mary í Garði og Jóannes N. Dalsgaard halda, at føroyski hugburðurin til samspæli millum borgarar og myndugleikar framvegis er merkt av eitt sindur av undirbrotligheit.

- Rætturin hjá borgarunum er ikki í fokus í øllum almannaverkinum. Hetta sást aftur í tí, at almennir stovnar fáa eina játtan á fíggjarlógini, men eingi krøv eru til, hvussu hesir pengar skulu brúkast. Eingin tosar um eitt minstamark fyri, hvat fólk skulu hava, staðfestir Mary í Garði.

Sum avleiðing av hesum eru almennu starvsfólkini og almennu umsitingin sera sárbør, tí tey enda við at skulu taka virðisavgerðir, sum kanska áttu at ligið hjá borgarunum og politikarunum, heldur Mary í Garði.

- Politiska pressi endar í skipanini heldur enn hjá politikarunum, staðfestir hon.

## Verjar og avvarandi

Samstarvið millum bústovnar og avvarandi er í grannalondum okkara formaliserað við greiðum verjulógum, og har er eisini vanligt, at hvør bústovnur hevur eitt brúkararáð, har tey avvarandi sita og kunnu fylgja við í tí yvirskipaða arbeiðnum á stovninum.

Í Føroyum hava vit eina verjulóg frá 1922, sum í stuttum merkir, at ein persónur sum verður ómynduggjørdur, missir øll rættindi fyri lívið, og tað almenna verður verji. Harumframt er leikluturin hjá teim avvarandi er ikki greitt útgreinaður í nakrari føroyskari reglugerð.

- Samstarvið er ymiskt frá stovni til stovn, men eg haldi, at vit øll síggja avvarandi sum eina týdningarmikla ressursu, sigur Jóannes N. Dalsgaard. Men í summum førum eru tey avvarandi ósamd við tann menningartarnaða, og so mugu starvsfólkini gera eina meting, og onkuntíð gongur hon upp á tvørs av tí, sum tey avvarandi ynskja, sigur hann.

- Men tað er ikki ætlanin, at starvsfólk skulu taka sær av persónligum áhugamálum hjá teim menningartarnaðu. Í dag verður hetta í ein vissan mun gjørt av foreldrum og systkjum, men tá tey avvarandi antin eru deyð ella ikki orka at luttaka, so er støðan ógreið, viðgongur Jóannes N. Dalsgaard.

## Praktisera nakað annað

Manglandi fleksibiliteturin í verjulógunum ger eisini, at bæði almenna umsitingin og starvsfólk eru noydd at praktisera nakað, sum ikki er formliga rætt.

- Um tann menningartarnaði ikki verður ómynduggjørdur, hevur hann fullan ræðisrætt í øllum sínum lívi. Men um hann ikki er førur fyri at taka sær av onkrum, kunnu vit fara inn og stýra tí. Hetta er ikki heilt rætt av okkum, men alternativið er at viðkomandi verður ómynduggjørdur, og tað tað hevur so øðiliga stórar avleiðingar, at tað verður ikki gjørt uttan tað er alneyðugt, sigur Jóannes N. Dalsgaard.

Bæði stjórin í Nærverkinum og leiðarin á Trivnaðartænastuni halda, at tey menningartarnaðu á nógvum økjum eru væl fyri í Føroyum, og tey føroysku starvsfólkini á økinum eru væl útbúgving í Danmark og øðrum londum, har lógarverkið er meira framkomið.

- Men vit kunnu ikki seta avsett í lógarverkinum, sigur Mary í Garði, stjóri á Nærverkinum at enda.